FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Leiðbeining til umsóknarblað um upptøku á MA í Løgfrøði 2021 á Fróðskaparsetri Føroya

<u>Les leiðbeiningina væl, áðrenn tú fyllir umsóknarblaðið út. Skriva týðiliga, helst við spjaldrastavum</u>

Endamálið við útbúgvingini er at geva tí lesandi førleikar á høgum støði í løgfrøði. Tey útbúnu skulu fata og kunna greina lóg og løgfrøði við atliti at røð av løgfrøðiligum evnum, umframt lógkønari útgávu og lóg hjá smáum løgdømum í samveldisstøðu. Málbólkur okkara er virkandi og komandi fyrisitarar og ráðgevar í vinnuni, hjá feløgum og hjá tí almenna, eisini advokatar, dómarar og politikarar, leiðarar og onnur ið eru sett at stýra og ráða. At søkja um upptøku krevst útbúgving á bachelor ella á øðrum hægri stigi. Útbúgvingin skal vera viðkomandi fyri lesturin í løgfrøði, tvs.vera á nóg høgum akademiskum stigi og hava nóg mikið av kunnleika um lóg. Hesar kunnu vera bachelor í lóg, samansettar útbúgvingar við lóg (vinnurættur, kriminologi) ella líkar útbúgvingar (søga, stjórn, samfelagsfrøði), har lóg er partur av útbúgvingini. Til ber eisini at lúka krøvini um akademiska og viðkomandi undanútbúgving við at vísa á eftirútbúgving og royndir. Sera viðkomandi eru tikin stakskeið í lóg á Fróðskaparsetrinum. Viðkomandi royndir kunnu vera í umsiting av lóggávu, leiðsla hjá stovni ella fakfelag, sitið í kommunustýri ella á tingi, starv í grannskoðan ella øðrum eftirliti. Týðandi er at lýsa og skjalfesta førleikar og royndir.

1. **Persónsupplýsingar**

   *P-tal*: Um tú hevur føroyskt p-tal, verður tað skrivað her. Hevur tú ikki tað, skrivar tú føðingardag, mánað og ár í teir fyrstu 6 rútarnar til p-tal. Teir 3 síðstu rútarnir eftir strikuna skulu so standa tómir.

   *Fornavn*: Her skrivar tú fornavn/nøvn og millumnavn.

   *Eftirnavn*: Her skrivar tú eftirnavnið. Minst til, at øll hava bert <u>eitt</u> eftirnavn.

   *Bústaðurin* er tað staðið, har ið tú nú býrt. Flytur tú, er tað av týdningi, at tú beinanvegin boðar Fróðskaparsetri Føroya frá nýggja bústaði tínum.

   *Ríkisborgaraskapur*: Upplýs ríkisborgaraskap tín.

   *Teldupostur*: SKAL fyllast út.

   *Skerdur virkisførleiki*: Fróðskaparsetrið ynskir, at tú gert vart við møguligar skerdar førleikar (t.d. orðblindni, niðursetta hoyrn ella sjón, ella sálarligar avbjóðingar), soleiðis at tíð er til at gera neyðugu fyrireikingarnar til tess at tryggja øllum lesandi á Fróðskaparsetri Føroya somu møguleikar frá lestrarbyrjan.

2. **Upptøkugrundarlag**

   Her skrivar tú árið, tá ið tú tókst prógv, og heitið á útbúgvingini. Eisini skrivar tú nummar á fylgiskjalið, prógvið, sum skal sendast við.

   Av tí orsøk, at stórur partur av undirvísingartilfarinum er á skandinaviskum og enskum, og at undirvísingin lutvíst fer fram á enskum, er neygugt at hava góðar førleikar í hesum málum. Undirvíst verður lutvíst eisini á bæði føroyskum og skandinaviskum máli.

3. **Starvsroyndir**

   Starvsroyndir verða skrivaðar her. Talan er um starvsroyndir, sum eru viðkomandi fyri løgfrøðiyrkið.

   Tú kanst senda viðmæli frá arbeiðsgevarum við umsóknini. Til ber eisini at senda váttan frá arbeiðsgevara. Oyðublað er á síðu 3 í umsóknarblaðnum.

4. **Aðrar viðkomandi royndir og skeið** Her verður upplýst um aðrar førleikar, sum skulu takast við í metingina av umsókn tíni. Talan kann vera um t.d. stakskeið í lóg tikin á Fróðskaparsetrinum ella á øðrum universitetum, eftirútbúgving, málsligar førleikar í enskum, KT-førleikar, ella annað, ið tú sum umsøkjari ynskir at upplýsa.

5. **Undirskrift - MINST TIL HENNARA!** Umsóknin verður einans viðgjørd, um hon er dagfest og undirskrivað.

   Tú skalt sjálv/ur dagfesta og undirskriva umsóknina. Hevur tú ikki møguleika til tað, kanst tú geva eina fulltrú til ein annan persón, sum so hevur fulltrú til at søkja tína vegna. Henda fulltrú skal sendast saman við umsóknini. Oyðublað til fulltrú er síða 3 í umsóknarblaðnum.

**Umsóknarfreistin til MA í løgfrøði er:**

**1. juli 2021 á midnátt**

Umsóknin kann sendast teldutøk til:

lestur@setur.fo

ella við Posta til:
Fróðskaparsetur Føroya
J. C. Svabos gøta 14,
Postsmogu 272,
FO-110 Tórshavn

Eisini ber til at leggja hana í postkassan á Lestrarskrivstovuni, J. C. Svabos gøtu 7.

*Studni* vil vita, um tú fert at søkja um ÚS lestrarstuðul. Fyri at fáa ÚS skal ein vera fulltíðarlesandi. Eisini er krav um, at tú ikki ert meira enn eitt ár seinkað/ur eftir lestrarætlanini fyri útbúgvingina.

Boð um upptøku verður sent øllum umsøkjarum í seinasta lagi fríggjadagin **9. juli 2021**.

Játtan fyri, at umsøkjari tekur við lestrarplássinum, skal vera Setrinum í hendi í seinasta lagi sunnudagin **1. august 2021 á midnátt**.

**Hjálp í sambandi við upptøku**

Eru spurningar í sambandi við umsóknarblað ella upptøku annars, ber til at venda sær til Lestrarskrivstovuna á tlf. 352520 ella umvegis t-post til LSS@setur.fo. Spurningar viðvíkjandi útbúgvingum kunnu setast útbúgvingarleiðarum og lestrarvegleiðarum, sí nærri kunning á heimasíðuni www.setur.fo.